## Zola ætlar sær Gudjohnsen

Komandi arbeiðsgevarin hjá Eidur Gudjohnsen eitur møguliga West Ham. Tað staðfestur Gianfranco Zola, venjari. – Gudjohnsen eru ein sera, sera dugnaligur fótbóltsspælari. Men eg eri vísur í, at West Ham ikki er einasta felagið, sum hevur sýnt honum áhuga, sigur Zola við SkySports. Eidur Gudjohnsen hevur seinastu árini spælt við FC Barcelona, men leiðslan hevur greitt honum frá, at hann ikki er ynsktur í felagnum longur.



## Rosenborg setur stór mál

Rosenborg, sum í farnu viku sendi NSÍ úr Evropa League kappingini, hevur sett sær stór mál fyri kappingarári. Felagið setur sum krav, umframt at vinna bæði landskappingina og steypakappingina, at fara ósigrað gjøgnum kappingarári. – Eg veit ikki um onnur feløg enn Arsenal, sum hava megnað tað. Men tað ætla vit, og tað hevði verið stórt, um tað eydnaðist, sigur Erik Hamrén, venjari hjá Rosenborg, í norskum miðlum. Rosenborg hevur ikki tapt í fyrstu 17 av 30 landskappingardystunum.

# Tjaldurs dreingirnir í limusinu

**Tað var stílur yvir tí, tá ið dreingirnir á Tjaldrinum tryggjaðu sær fyrsta FM heitið í átta ár**

5-MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Teir hava verið fullkomiliga suverenir higartil í ár, og í góða veðrinum í Sandavági vunnu teir sætta sigurin av seks møguligum. Tað er dreingjamanningina á Tjaldrinum, sum tað her snýr seg um. Fulla úrtøkan eftir seks róðrar bar við sær, at Tjaldrið var fyrsti meistarin í 2009. Tillukku við tí!

Síðani 1973, tá ið FM kappingin fekk tað skapið, sum hon framvegis hevur, hava dreingirnir hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ fýra ferðir áður vunnið FM: í 1986, 1991, 2000 og 2001.

Í 1986 vann Tjaldrið tríggjar av fimm FM róðrum, í 1991 vann Tjaldrið fimm av seks FM róðrum, í 2000 vann Tjaldrið allar seks FM róðrarnar, og í 2001 vann Tjaldrið tríggjar av seks FM róðrum.

Setningurin hjá nýkosnu meistarunum verður á Ólavsøku at syrgja fyri, at Tjaldrið við dreingjamanning fyri fyrstu ferð nakrantíð vinnur allar sjey FM róðrarnar.



Tað var stílur yvir tí, tá ið Tjaldrið tryggjaði sær FM heitið. Sigurin var ongantíð hóttur, hóast munurin aftur til Blik ikki var meiri enn ein skutur, tá ið teir fóru um málið.

Tjaldrið var fremst frá tí, at startskotið hevði ljóðað. Bátarnir hjá Argja Róðrarfelag – Blikur og Teistin – royndu saman við Royndini Fríðu at bjóða av, men tað eydnaðist ongantíð avbjóðarunum at taka Tjaldrið, sum eina løtu var tað mesta av einari bátslongd fremst.

Kanska tóktist tað sum um, at Tjaldrið fór eitt sindur tíðliga undir endaspurtin, tí eftir at teir í nøkrum tøkum høvdu gingið frá, so styttist munurin aftur, áðrenn Tjaldrið á síðstu metrunum megnaði at halda tørn. Meistararnir tóktust hava kontrol á støðuni, tí beinanvegin, tá ið teir vóru farnir um málið, lupu teir upp í bátinum!

Meistaraheitið kom ikki óvart á rógvararnar og tey, sum taka á við Tjaldrinum. Formaðurin í felagnum, Ludvík við Stein, hevði syrgt fyri, at hvít limusina var komin vestur til Sandavágs eftir nýklæktu meistarunum, sum í neystinum á Glyvrum fingu ta móttøku frá foreldrum, familju, nevnd og øðrum, sum tað sømir seg sonnum meistarum at fáa.

Eingin kapping er um silvurplássið, sum Blikur hevur vunnið. Tað er møguleiki fyri kapping um bronsuplássið, sum Teistin annars tykist vera tryggur á. Junkarin og Royndin Fríða lúra, og felags fyri hesar og allar aðrar er, at ólavsøkusigur hevði verið kærkomið plástur á, nú Tjaldrið hevur verið so einaráðandi. Men tann spurningin ætla nýggju meistararnir sær at vera við til at svara – við stíli!

# Tvøroyri og Miðvágur stavn um stavn

**Í FM kappingini er spenningurin so stórur, sum tað ber honum til at vera, men um avrikið á Vestanstevnu skal nýtast sum barometur, so er Tvørabáturin stórur favorittur at vinna á Ólavsøku**

6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Stigatalvan sigur, at kappingin er so tøtt og spennandi, sum tað ber henni til at vera. 6-mannaførini við monnum á Tvøroyri og Miðvági liggja stavn um stavn. Báðir bátarnir hava 39 stig, og harvið verður tað ólavsøkuaftan, at tað fer at verða avgjørt, um tað verður Tvørabáturin ella Riddarin, sum fer at vinna FM heitið.

Felags fyri Tvørabátin og Riddaran er, at teir ongantíð áður hava vunnið FM. Tí sigur tað seg sjálvt, at tað bæði í Miðvági og á Tvøroyri hevur verið fylgt væl við í kappróðrunum, sum hava verið higartil í ár, og tað er sjálvsagt, at kappróðrarprátið er nógv, nú bátarnir síðani í gjár hava fyrireikað seg til stóru finaluna, sum verður fimtan dagar.

Tað kann nógv venda upp ólavsøkuaftan, sum nú vendir niður, og tað kann nógv venda niður ólavsøkuaftan, sum vendi upp á Vestanstevnu. Men um avrikið í Sandavági skal verða grundarlag fyri meting um vánirnar at vinna FM, so er eingin ivi um, at Tvørabáturin er greiður favorittur.

Í fimm teimum fyrstu róðrunum var kappingin ógvuliga tøtt. Á Vestanstevnu var eingin kapping. Tvørabáturin, sum á Varmakeldu vann við so framúr endaspurti, vísti onga náði.

Suðuroyingarnir løgdu seg beinanvegin framum hinar, og síðani vóru teir ongantíð hóttir. Tá ið Tvørabáturin fór um málið, var meiri enn ein bátslongd aftur til kappingarneytarnar.

Sundabáturin var leingi næstfremstur, meðan Riddarin eftir vánaligan start hevði strítt seg fram á triðja plássið. Á síðstu trý hundrað metrunum bjóðaði Riddarin Sundabátinum av, og tá ið bátarnir fóru um málið, hevði Riddarin tryggjað sær næstfremsta plássið, sum kann fara at vísa seg avgerandi, tá ið FM kappingin fer at verða avgjørd ólavsøkuaftan.

Undan Ólavsøku hava bæði Riddarin og Tvørabáturin 39 stig!

